VALGREINAR

# Arbeiðsmarknaðar-politikkurin skal dagførast í næstu tingsetu !

**Joan Ziskason**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy*



Javnaðarflokkurin hevur, sum einasti flokkurin til hetta løgtingsvalið, ítøkilig uppskot, hvussu hesar lógir skulu dagførast:
- Vanlukkkutryggingarlógin
- Dagpeningalógin
- Semingslógin

Umframt uppskot uppá loysn á hesum málum:
- Eftirlønin
- Arbeiðsloysisskipanin
- Arbeiðsumhvørvið
- Brúkaramál

jozi@post.olivant.fo

# Frælsi?

**Ása Olsen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Orðið frælsi verður nógv nýtt í hesum døgum.

Onkur setur orðið í samband við ríkisfelagsskapin. Men hvat merkir orðið frælsi? Sambært føroysku orðabókini merkir tað at verða fríur.

Tá ein tosar um at verða fríur, so merkir tað heilt einfalt, at ein ongum skyldar nakað, ella at ein ikki er bundin av nøkrum, ið kan stilla krøv til ein, tað er frælsi.

Um eg skyldi t. d. einum banka pening, so kann hesin bankin seta mær krøv, í samband við mína skuld.

Nú skrivingin er í hæddini um samband ella loysing, so mugu vit minnast til, at vit kunnu ikki tosa um frælsi, um vit skulu byggja okkara framtíð uppá tað, danir vilja gjalda. Fíggjarligt frælsi fáa vit bert við sjálvi at klára at gjalda tað, okkara landshúsarhald kostar.

Vit kunnu nýta nógv ymist fyri at verja okkara støðu, fyri ella ímóti ríkisfelagsskapi, men tað er ein sannroynd, at í dag ráða vit ikki í egnum landi.

Við at yvirtaka stig fyri stig øll málsøkir, kunnu vit tosa um frælsi, so hvørt vit sjávi kunnu gjalda kostnaðin av teimum yvirtiknu málsøkjunum.

Tí er einasta gongda leið til frælsi, stig fyri stig politikkurin hjá Sjálvstýrisflokkinum.

Velji ein sterkan Sjálvstýrisflokk inn á ting.

# Aftur eitt skot fyri bógvin hjá vinnuni í Suðuroy

**Sverre Midjord**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy*



Nú Smyril fer í dokk, hevur Strandferðslan sett eitt skip inn, sum ikki á nakran hátt nøktar tann tørvin, sum okkara virkir hava krav uppá.

Tað er uppá tíðina, at okkara fólkavaldu umboð gera vart við hesi viðurskifti og krevja, at vit í Suðuroy fáa sømulig viðurskifti. Skyldurnar kenna vit og gera vit, krøvini frá tí almenna verða fylgd, tey finna fram til okkara, men rættindi sum samfelagsborgarar tey eru heldur smálig, tað er heldur forðingar enn rættvísis sømdir.

Tað verður sett eitt skip inn, sum siglir seinri enn Smyril og sum ikki á nakran hátt nøktar tørvin. Tað er ikki bara átaluvert, tað er skaðiligt fyri fiskaídnaðin her hjá okkum.

Tað at Strandferðslan ikki fann annað skip til at røkja hesa sigling nøktandi, til avloysing av tí sigling, sum Smyril røkir, tað kann ikki góðtakast. Suðuroyggin hevur ikki flutt seg, so teir kendu viðurskiftini, men teir lata sum einki, tað at teir ikki funnu annað skip er beinleiðis undanstøkking, sum ikki kann góðkennast.

Teir hava havt meira enn eitt ár at finna avloysara skip, so tíðina hava teir havt, ístðain fyri at betra um viðurskiftini, so lata teir bert standa til, tað er greitt at tað eru nógv ting sum skulu fáast uppá pláss.

Siglingin um suðuroyarfjørð er eitt, hetta skal ikki endurtaka seg. Strandferðslan er ein almennur stovnur og skal røkja alt samfelagið og ikki sum nú, bert lata standa til tá tað viðvíkur Suðuroy.

Eg fari sum tykkara umboð, at fremja tiltøk til bata fyri Suðuroynna.

# Tað er onki pláss til tín!

**Katrin Jønsson**
*Valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Tá ið ein er komin í tað støðu (orðsøkirnar kunnu vera so nógvar), at einasti rætti bústaðurin er á einum røktarheimi, so duga vit nokk ikki heilt at ímynda okkum, hvussu ringt tað følist at fáa at vita .

"Tað er onki pláss til tín"

Ein sera vónleys støða at koma í, hjá tí,ið hevur brúk fyri røktarheimsplássi.

Bráðfeingis tørvurin á Røktar- & Ellisheimsplássum er sera stórur, tí ætlar Javnaðarflokkurin at arbeiða fyri at neyðugar íløgur verða gjørdar, so at 160 pláss skullu verða tøk komandi 4 árini.

Landskassans partur av íløguni verður uml. 80 mill. kr. í 4 ár og fer Javnaðarflokkurin at veita kommunum trygd fyri, at Landskassans partur av íløgum og rakstri verður játtaður.

Vit mugu ásannað at verandi Landsstýrið hevur raðfest slíkt ógvuliga lágt, tí ikki eitt røktarheims pláss er komi aftrat hesi seinastu 4 árini.

Tey gomlu hava verið við til lagt grundarlag undir tað samfelag vit í dag nýta gott av.

**Tey góvu alt!**

Lat okkum vera við til ay geva teimum eitt so gott lív, sum tað nú ber til at fáa, hóast sjúku og elli.

Javnaðarflokkurin er einasti flokkur ið kemur við ítøkiligari ætlan á hesum øki, onnur meina at okkurt má henda hvat tað so er.

Víð at velja Javnaðarflokkin til Løgtingsvalið tann 30. apríl, er tú við til at hjálpa okkara gomlu og sjúku.

Gott val!

# Tá mál skulu røkkast

**Poul Michelsen**
*Valevni Fólkafloksins*



„Ein sunn sál í einum sunnum likami" er eitt orðatak, sum verður brúkt í samband við ítrótt, og ítróttaravrik. Ongin ivi skal vera um, at hetta er so satt, sum tað er sagt. Er sálin í javnvág og kroppurin røktur er avrikskraftin størst.

Hetta orðatak kann lættliga førast yvir á øll onnur avrikshugtøk tað veri seg mentunarlig, politisk, vinnulig, tjóskaparlig v.m.

Útgangstøðið er altíð tað, at ongin er minni, enn hann ger seg sjálvan. Tað snýr seg um at meta sín egna førleika, seta sær nøkur mál og royna at røkka teimum.

Vert er – í hesum sambandi – at hugsa um, hvat sváru kreppuárini høvdu við sær. Trygdin frá ríkisfelagsskapinum var burtur, sama trygdin, sum javnaðar- og sambandsflokkurin ídag kappast at selja føroyingum.

Vit tóku í egnan barm, mettu um førleika okkara og settu út í kortið. Og fyri fyrstu ferð í søgu føroyinga, vóru allir føroyingar í sama báti, og við góðum áralag smeyg báturin sær gjøgnum vandasjógv inn á slættari sjógv. Egin megi og máttur vísti seg at røkka, og framd avrik standa sum varðar á leiðini. Avrik sprottin úr eini heilhjartaðari sál í javnvág og egnari megi.

Men vandi er í allari vælferð. Við góðari hjálp frá donsku javnaðarstjórnini og nú vinstrastjórnini hevur tað eydnast javnaðar- og sambandsflokkinum aftur at grugga føroyskan politik og føroysku sálina soleiðis, at málið nú aftur er támut. Tað snýr seg aftur um, hvat vit kunnu fáa og ikki forvinna. Orkan, sum bleiv brúkt til at menna og styrkja føroyska samfelagið, verður nú brúkt uppá innahýsis klandur. Ringt áralag og ongin kós.

Aftur snýr tað seg um at spjaða ómegn og mistreysti – ein politiskur perivellingur sum sæst aftur í teimum vallyftum, sum givin verða frá sambandsflokkunum. Næstan alt ber til, og har sum afturhaldsflokkarnir ikki røkka, taka tey einstøku valevnini yvir.

Lyftini skulu tryggjast av dønum. Í Danmark sita Rasmussen og Rasmussen og gníggja hendur og fáa sær ein vælfortjentan látur. Bert teir vita, hvat trygdin er verd, og bert teir vita, hvat ríkisfelags- skapurin stendur fyri.

Tá lagna føroyinga skal avgerast sita Rasmussen og Rasmussen báðu megin borðið - ímeðan kunnu vit sleppa at spæla fólk í húsi.

Halda sambandsflokkarnir at føroyingar longu hava gloymt kreppuna, og gloymt tann førleika, sum ein virðilig tilvera kann skapa okkum ? Alt hetta fáa vit svar uppá 30. apríl.

Mítt álit á føroyingin er tó at hann dugir at gjøgnumskoða avleiðingarnar av aftur at duva uppá danska trygd. Mítt álit á føroyingar er, at vit síggja ríku møguleikarnar, vit sjálvi eiga í landi og fólki. Mítt álit er, at føroyingar vita at ræðuspáanir frá sambandinum ongantíð hava fingið rætt, men at allur framburður í Føroyum er sprottin úr tí framdrift, sum sjálvstýrishugsjónin ber í sær – " ein sunn sál í einum sunnum likami".



VALGREINAR

# Sambandsflokkurin – tað trygga – akkerið í føroyskum politikki

**Atli Hansen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Eysturoy*



Hesa seinastu tíðina hava bæðið Fólkaflokkurin og serliga Javnaðarflokkurin havt eitt gott eyga til fólkið á sambandsskútuni. Hetta er gott fólk, vita teir, og javnan er at frætta í fjølmiðlunum, at manningin bara veksur.

Teir dyrgja framvið - hvør í sínum borði - og royna sum Sirenurnar á sinni við sínum lokkandi tónum at draga sambandsfólki yvir á teirra skútu.

Men teir gera rokning uttan vert. Sambandsfólk skiftir ikki hýru millum hvønn túr. Tey eru støðuføst og fara avstaðaftur túr um túr - eisini sjálvt um síðsti túrur kanska ikki royndist so væl. Tey vita hvønn veg, leiðin gongur og at vit helst fáa túr inn hesaferð eisini.

Sambandsflokkurin hevur fasta kós og er kjølfestur við teimum bestu virðum í okkara fólki. Hann er ikki til at koma uttanum í politiskum samgongum. Hann liggur fastur fyri sínum akkeri og er altíð til reiðar at hála hinar flokkarnar á beint aftur tá íð teir sveiggja ov nógv til síðis. Og tað er neyðugt at hava Sambandsflokkin við í eini komandi samgongu, tí har er nógv at taka upp og rætta inn.

Góðu sambandsfólk! Tað hevur helst ongantíð fyrr í Føroya søgu verið so umráðandi at halda fast um sambandshugsjónina og at fara á val og geva seg til kennar sum sambandsfólk. Vit tóku okkum saman til fólkatingsvalið og tað ber til at taka seg enn meira saman einaferð afturat og vísa fullveldisfantastunum, at Føroya fólk í hvussu so er ikki tekur undir við teirra eksperimenturm. Teir spæla við eld, men hava ikki tamarhald á støðuni.

Ein krossur fyri Sambandsflokkin er eitt JA til ríkisfelagsskapin - ein trygg lega, haðani vit sum ríkisborgarar hava møguleikar sum heimsborgarar. Vit rúmast ikki í einum fullveldi. Har er ov trongt til okkum.

# Hvat er rætt

**Kaj Leo Johannesen**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymi*



Miðskeiðis í ár 2000 kunngjørdi landsstýrið: vegna Fólkaflokkurin Anfinn Kallsberg Løgmaður vegna Tjóðveldisflokkin Høgni Hoydal, landsstýrismaður, og vegna Sjálvstýrisflokkin Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, Føroya fólki soljóðandi: "Ein avgerandi fortreyt fyri at vit kunnu taka politiska ábyrgd er, at vit verða loyst úr teirri búskaparligu og politisku bindingini, sum blokkstuðulin hevur við sær". Og "í ár verður bert ein triðingur av danska studninginumbrúktur í samfelagnum".

Fólk verða biðin leggja sær hesi orð í geyma !

Í ár 200l kom so landskassaroknskapurin fyri ár 2000 út, og hann vísir svart uppá hvítt, at landskassin hetta árið hevði eitt **bruttokassaundirskot** upp á 300.188.000,00 krónur, sum varð fíggjað við nýggjum 300-milliónaláni til landskassan.

Hvar teir óbrúktu 2/3 av tí "danska studninginum" eru goymdir, mugu vit fáa at vita.

Í hesum sama ári við 300 milliónum í kassahalli fekk landskassin fylgjandi upphæddir úr ríkiskassanum:

| | |
|---|---|
| Blokkstuðul | 973 mill. |
| Endurgjøld | 15 mill. |
| Yvirskot frá Nationalbankanum | 25 mill. |
| Tilsamans | 1.013 mia. |

Hóast hetta so hevur meirilutin í løgtinginum:

Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin gjørt av, at í ár 2002 skal stuðulin úr ríkiskassanum minkast við 366 milliónum. At verandi samgonga er ein hóttan móti vælferðar samfelagnum, dugur hvørt mansbarn at síggja, og skulu vit sleppa undan boðabrotum í bæði borð, er bert eitt at gera:

**vel Samband sett krossin á lista B.**

# Fólkaflokkurin og skattalætti???

**Jákup Lamhauge**
*Valevni Sambandsflokksins í Eysturoy*



Aftur til løgtingsvalið hesaferð tekur Fólkaflokkurin fram gomlu mappuna við vallyftum sum nýtt hava verið at egna við í minsta lagi seinastu 30 árini.

Ein av hesum beitum, sum føroyingar í dag meta sum sjórikið agn, er táta fólkaflokksins um skattalætta.

Ein má hava loyvi at spyrja um ein polittiskur flokkur - sum seinasti fýra árini hevur átt løgmann og harvið havt landsins leiðslu um hendi - kann loyva sær at undirmeta føroyska veljaran so stórliga sum talan í veruleikanum er um.

Um vit t.d.taka 30 seinastu árini, so hevur ongin polittiskur flokkur í Føroyum sitið so langt áramál í landsstýrissamgongu sum júst Fólkaflokkurin Og ikki bert hetta, at fólkaflokurin hevur sitið í samgongu í langt áramál, men Fólkaflokkurin hevur sanniliga eisini sitið í lyklastøðum tá um skattamál hevur verið um at røða - m. a. við at sami flokkur í fleiri umførum hevur umsitið fíggjarmál eins og løgmansembætið.

Sum nevnt omanfyri, so hevur Fólkaflokkurin undan hvørjum vali seinastu 30 árini lovað føroya fólki skattalætta,men higartil hava royndirnar víst, at talan bert er um tóm orð - skattalætta kenna fólk sera lítið til.

Tí eru tað mong í dag sum spyrja um tað ikki hevði verið meira hóskandi fyri

Fólkaflokkin, at hann gevst við at halda fólk fyri gjøldur og ístaðin mælir føroya fólki til at bíða til fólkið hevur valt aðra manning at taka við landsins leiðslu - eina manning sum gjølliga tekur øll mál upp til viðgerðar - herundir eisini spurningin um møguligar skattalættar.

# Útbúgving – eitt tilboð til øll

**Eyðna Vidtfeldt**
*valevni Sambandsflokksins í Sandoynni*



Fleiri av skúlunum kring landið eru so illa farnir og illa útgjørdir, at umhvørvið beinleiðis er við til at tarna lærumøguleikunum hjá næmingunum.

Í dag er sjálvur skúlin ábyrgd kommunurnar at halda viðlíka - ella at byggja nýggjan - men tað eru kommunur, ið ikki megna hesa skyldu, tí tær eru bundnar av skuld, ella hava prioritera onnur byggistig framum, og tí ikki búskaparliga makta at seta eina slíka ætlan í gongd.

Eg meti, at hesi viðurskifti eru so altavgerandi fyri víðari útbúgving hjá hesum næmingum, at ein loysn á henda trupulleika hevði verið, at býtið millum gjaldið hjá kommunu og landið bleiv broytt, so at landið í hesum førið kemur at gjalda størra partin av hesi íløgu.

Børnini eru okkara framtíð, og um tey ikki fáa virðulig kor rundanum henda grundarstein til lívið, er stórur vandi fyri at tey missa hugin til víðari lærdóm, og tað verður í síðsta enda ein missur hjá landinum av útbúnum fólki!

Sambandsflokkurin vil at øll skulu hava eins góðan møguleika at fáa ynsktu útbúgving - við hesum sikra vit, at øll hava møguleika at røkka hesum málið!

# Unglingar og familjur, sum seta búgv

**Niels Th. Pedersen**
*Valevni fyri Norðstreym*



Tit eru sum oftast nýútbúgvin.
- Tit stovna familju.
- Tit skulla seta tykkum í búgv.
- Tit stovnseta møguliga tykkara egna virkið.

Til alt hetta krevst fíggjarlig trygd, treysti, trivni og áræði, men tað er eingin forðing.

Ein skal forsvarað, lestrarlán, sethúsalán, barnaansing og møguliga startkapital til virkið.

Hetta krevur í flestu førum, at bæði foreldur eru í løntum arbeiði.

Skatturin og avgjøld eru sum er ov høg.

Er tað so rætt, at tað skula leggjast enn størri byrðar á hesar herðar, sum framman undan eru niðurtyngdar av avgjøldum og skattum?

Nei!

Tí niður við skattinum til 35%,og fá ein glaðan arbeiðssaman ungdóm, sum hevur nakað at síggja fram ímóti, tá ið hann møtir til arbeiðis.

Tit skulu jú liva eitt virðiligt lív eftir arbeiðsaldurin.

Vel tí ein sterkan Fólkaflokk á Ting tann 30. apríl, tí hann vil hjálpa tær.

Gott val! Við Fólkaflokskvøðu.